# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

†

## Andlát og jarðarferðir

**Ingebjørg M. Restorff**, ættað úr Tórshavn, andaðist leygardagin 1. septembur, 85 ára gomul. Bønarhald verður í Vesturkirkjuni í kvøld kl. 18. Jarðarferðin verður úr Vesturkirkjuni týsdagin kl. 13.

**Silvurbrúdleyp**

Týsdagin 4. september hava hjúnini Tove og Niels Borgardal í Sandvík silvurbrúdleyp. Tey eru burturstødd.

**Dagurin**
**4. september. Teodosia.** Navnið er helst komið upp í álamanakkan í staðin fyri mansnavnið Teodorius, tí at hann hevði longu 2. apríl sum halgidag.

# Rundir fuglar í Smiðjuni

Hósdagin 30. august læt framsýningin "Færøske kugle fugle" hjá Sten Asbirk upp í Smiðjuni í Lítluvík.

Sten Asbirk er dani, føddur í 1948 og býr í Roskilde. Hann er er útbúgvin fuglafrøðingur, men hansara dagliga arbeiði er í danska Miljøministeriet í Keypmannahavn.

Sten Asbirk var fyrstu ferð í Føroyum í 1968 og so aftur í 1981. Hann hevur áður havt framsýningar í Grønlandi og í Orknoyggjunum, men hetta er fyrstu ferð, at hann hevur framsýning í Føroyum.

Hann hevur stóran áhuga í fuglum og fuglalívi. Hann kallar framsýningina »Færøske kugle-fugle«, tí á øllum myndunum eru fuglarnir rundir sum kúlur. Ein rættuliga sermerkt framsýning við 46 ymiskum myndum. Myndaevnini er av fuglum, sum eru í Føroyum, sum t.d. tjaldur, æða, lundi, lomvigi og álka.

Framsýningin er opin soleiðis: Mánadagin 3. september kl. 12-17, týsdagin 4. september kl. 12-18, og mikudagin 5. september kl. 12-15.




*Sten Asbirk listamaður hevur í hesum døgum framsýningina »Kugle-fugle« í Smiðjuni í Lítluvík*

*Mynd: Magnus Gunnarsson*

# Realskúlanæmingar skúlaárið 1961-62

## Færøernes Mellem- og Realskole

Mynd frá "Realskúlaframsýningini 1916-66", sum Jórunn Dánjalsdóttir skipaði fyri í Kommunuskúlanum í Havn frá 23. juli til 4. august 2007.

Her er eitt fimleikaralið við gentum skúlaárið 1961-62. Aftara rað f.v.: Kára Hermansen (Wacher), Anna Margretha Frandsen (Niclasen), Jórun Arge, Helena Andreasen, Svanhild Seyer Hansen, Glory Thomsen (Hjelm), Jakoba Debes, Jonna Justinussen, Elinbjørg Højgaard, Kirstin Holm, lærari, og Helga Hentze.

Fremra rað f.v.: Sonja Arge (Skúvadal), Elisabeth Eliasen (Egholm), Gunvør Mortensen (Joensen), og Gulla Waagstein (Øregaard)

*Myndaeigari: Ása Justinussen*

